Ingilín Didriksen Strøm
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a
Fyrispurningur um fýrverk, settur landsstýrismanninum við umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at endurskoða lóg og kunngerð um fýrverk frá 1969 m.a. við atliti at kemikalium, dálking og ljóðdálking?

Viðmerkingar:
Tá vit hugsa um fýrverk, hugsa flestu okkara um løtuna á midnátt, tá vit bresta úr einum ári inn í tað nýggja. Tað kann vera flott at hyggja at, men fýrverk hevur eisini keðiligar avleiðingar við sær. Tað snýr seg bæði um neistar, eldsloga, royk, ógvusligt ljóð og rusk, ið stendst av skotnum fýrverki. Tí kann tað vera skilagott at avmarka nýtsluna av fýrverki.

Hvørja ferð vit senda eina rakett til himmals ella festa í eina nýggjársbumbu, verður ein rúgva av kemikalium og tungmetallum leysgivin. Tey hvørva ikki, men enda úti í náttúruni. Roykurin frá fýrverki er bæði skaðiligur fyri menniskju, djór og plantur og økir um útlátið. Harafturat verður sjáldan alt fýrverk, ið er skotið, tikið upp, og liggur tað tí og dálkar í náttúruni. Hetta hevur sínar sjálvsøgdu dálkingaravleiðingar, umframt at tað kann enda í maganum á djórum.

Nógv djór verða eisini sera ávirkað av ljóðinum og ljósinum av fýrverki. Vit vita frá kanningum, at fuglalív er ávirkað í stóran mun og sum dømi kann nevnast, at fuglar í hundraðtali fullu til jarðar í Italska høvuðsstaðnum Rom aftaná nýggjárshald í farnu viku.[1] Tað er heldur ikki ókent, at kettur og hundar rýma og eru ógvuliga bangin, tá nógv verður skotið, og ofta verður skotið í fleiri dagar eftir nýggjárið er av. Hetta er møguliga av teirri orsøk, at fólk hava keypt so nógv fýrverk, at tey ikki náddu at skjóta alt nýggjársaftan. Tað vil siga, at henda skjótingin sum oftast er heilt óneyðug og til stóran ampa fyri mong.

Av øllum Norðurlondum er tað bara í Føroyum, at tíðarbilið fyri nýtslu av fýrverki ikki er avmarkað við lóg. Í Danmark er loyvt at skjóta frá 27. desembur til 1. januar. Í Noregi frá 31. desembur til 1. januar klokkan 2. Í Svøríki bara um nýggjársmundið, í Finlandi frá 31. desembur klokkan 18 til 1. januar klokkan 2. Í Íslandi frá 28. desembur til 6. januar. Sølutíðin er eisini avmarkað - frá 15. desembur til 31. desembur í Danmark, 27. desembur til 31. desembur í Noregi, 27. desembur til 31. desembur í Finlandi og 28. desembur til 6. januar í Íslandi. Føroyska lógin fyri fýrverk er frá 1969 og er ikki dagførd síðan. Tí er spurningurin, um tíðin ikki er komin til at endurskoða karmarnar fyri innfluting og nýtslu av fýrverki í Føroyum.

Á Løgtingi, 6 januar 2021

Ingilín Didriksen Strøm

[1] https://www.euronews.com/2021/01/01/hundreds-of-birds-found-dead-in-rome-s-streets-after-new-year-fireworks-displays